

*Stakkar við saltaðum grásúlum*

hava at taka til. Minst 60 sekkir av salti vóru settir klárir at hava við, tí grásúlan skuldu saltast. Eisini taka teir máttur, undirløg av plastikki ella øðrum og pressendinar, sum skulu brúkast til at breiða út yvir helluna. Harumframt er tað tann persónliga útgerðin hjá tí einstaka, so sum soviposar og undirlag at liggja á og at breiða oman á helluna í skýlinum, fyri at halda teimum herviligu tvístertunum burtur, sum er ein stór plága, tí serliga fyrr ræddist teir fyri at hetta kykt skuldi koma sær inn í oyruni á teimum.

Alt tók sína tíð áðrenn fiskifarið kundi seta kós móti Súluskeri. Súlusker liggur á víðopnum havi uttan nakra verju. Ein lítil geo – ella gjógv er á skerinum, har bátur kann koma inn og leggja at, meðan útgerðin øll var knossað upp á land. Tað var sjálvandi tungt at fáa alt upp á pláss uppum stórar klettar. Tungast vóru vatnføtini ella vatnkaggarnir.

Tað skuldi ikki bert niðanfrá, men eisini til onnur støð á skerinum. Tað lætti um tá ein av monnunum, sum var postmaður, fann uppá at leggja eina línu, meinlíkari tí, sum línudansarir plaga at ganga á, framvið ymsastaðni á skerinum. Henda línan kundi brúkast at ganga eftir, sum rennistrongur ella transportband. Tað tók eina tíð, áðrenn teir dugdu at fáa fulla nyttu burturúr hesum uppfinnilsinum, men tað kom at lætta almikið um, tá teir fingu tað at rigga.

## 200 súlur í senn

Tað ráddi um at verða væl klæddur á skerinum og ikki í nøkrum gløttum ella hálum, tað var ikki minst galdandi fyri tað, sum menn vóru í um føturnar, tí illgongt var nógvastaðni og høgir klettar at fara upp, sjálvt um tað ikki var talan um bjarglendi. Teir 10 menninir funnu seg til rættis í skýlinum, har teir skulu sova og matgera. Ein av teimum var altíð kokkur. Sjálvt arbeiðið við at taka súlurnar gekk, mestsum eftir einum samlibandi. Fremsti maður tók grásúlurnar úr reiðrinum, handaði teir til næsta mann, sum slerdi súluna til deyðis við eini kádissu niður á nakkan, hann lat hana so til ein triðja mann, sum skar høvdið av og legði fuglin í eina rúgvu.

Teir tóku einar 200 súlur í senn, ansaði eftir bert at taka grásúlurnar, men onkur ompil kom inn í millum við hvørt. Hetta tók teimum ein hálvan tíma. Rennistrongurin ella transportbandi framvið skerinum var her til góða hjálp, tá súlurnar koyrdar í sekkjum vórðu fluttir til roytingarplassið, sum var lagt har sum lotið var av tí mesta, fyri at fjaðrarnir skuldu fúka burtur, men tað eydnaðist ikki altíð, tí ofta vóru roytingarmennirnir bæði hvítir og gráir av fjaðrum og dúni.

## Á fabrikkini

Roytu fuglarnir verða so aftur koyrdir í sekkir og fluttir til serligt pláss, sum teir nevndu fabrikkin - ella the factory -, har helt arbeiði við at reinsa fuglin fram. Har høvdu teir kynt ein stóran torveld, ið lá soleiðis fyri, at tað vardi ímóti ættini, so tað bar til at koma nær við fuglinum at eldinum og svíða hann tað væl og virðiliga. Tað svidnað varð skavað av við einum knívi. Eitt var at svíða væl, men ansast mátti eisini ansast eftir at fuglurin ikki kolaðist.

Veingjabeinini verða nú skorðin av og fuglurin verður flaktur frá hálsinum og aftur í gjøgnum, tann langi hálsurin verður saman við innvølinum tikin úr. Skorið var á onkunstaðini fyri at fáa fuglin púra flatan og fyri at salt skuldi koma til allastaðni. Flakti fuglurin verður so tveittur á eitt undirlag ella eina presending, har hann lá eina løtu, til hann varð saltaður.

Tær roytu, svidnu og flaktu grásúlurnar vórðu saltaðar í ein stakk, sum stóð á einum undirlag av plastikk ella øðrum tøttum stoffi, sum teir høvdu til tað sama. Stakkurin var av einum serligum slag, sum tá hann var liðugur, mestsum líktist eini sátu ella fyri at endurgeva Murray, eini heltlendskari *broch*. Stakkastøði á undirlagnum var gjørt runt sum eitt hjól, grásúlurnar vórðu lagdir við føtrunum inn



*Súluveiðumenn*



*Sulasgeir ella Súlusker*

móti miðuni, hálsaskinnið var snarað so til, so at saltið ikki datt úr. Næsta jaður av súlum varð so saltað omaná tað fyrsta, og kanna var væl eftir, at hvør súla lá væl og virðiliga í salti, sum hon átti. Hæddin á stakkinum vaks í hvørjum og skránaði inneftir so hvørt sum hægri varð og endaði í einum árundaðum kolli. Kannað varð javnan eftir at allir súlurnar lógu sum teir skuldu í nóg nógvum salti fyri at kunna halda sær. Stakkurin varð ikki liðugur fyrr enn tann seinasta súlan varð komin upp á pláss. Presendingin var løgd omaná stakkin hvørt kvøld, fyri at regn ikki skuldi koma at. Tá liðugt var, tykist tað, sum um súlumenninir frá byrjan høvdu sett sær fyri, at við eini 2000 saltaðum grásúlum at gera eitt modell av eini hetlendskari *broch* á Súluskeri, sum minti um brochina á oynni Mousa ella Dun Carloway.

Nú arbeiði varð lokið var bert at bíða eftir fiskifarinum, sum skuldi koma eftir monnum, útgerð og veiði. Enn var kortini nóg mikið at gera við at pakka saman útgerðina og bera hana ávegis oman í gjónna. Tá so skipið var komið og alt annað var fingið umborð, var tíðin komin til at ríva um súlustakkin og fáa súlurnar umborð. Ein træsliska, sum hoyrdi til á skerinum, varð sett upp, og súlurnar vóru lagdar í hana, skjótt varð hon so gløtt av saltið og lýsi, at súlurnar skreiddu oman við fullari ferð og endaðu í eini máttu ella priesendingaskapilsi, sum forðaði fyri at teir endaðu á sjónum. Súlurnar vórðu so blakaðir í botnin á einum lítlum prámi, og rógvið var út til fiskifarið, har tær fyrst vórðu blakaðir upp á dekkið fyri síðani at enda í lastarúminum.

Sliskan varð løgd til viks, so ovarlaga, at brimi ikki tekur hana, so hon aftur kann brúkast næsta ár. Minst ein vatnkagga løgdu teir eftir, tí vatn var ikki á skerinum. Tað seinasta sum gjørt varð, varð rituelt at leggja ein stein oman á sama grótvarða, sum teir plaga at gera á hvørjum ári. Prámurin verður tikin umborð og fiskifarið við veiðu og monnum setur kósina móti Ness norðast á Lewis.

Umborð eru eini 2000 saltaðaðar grásúlur, ein rættiligur fongur, sum ein hópur av fólki sum hava sínar mentanarligu røtur um Nessleiðina gleða seg til at smakka. Tað er eingin trupulleiki at sleppa av við súlurnar til kenningar nær og fjar. Tað eigur at kunna berast saman við somu tíð á árinum heima hjá okkum, tá menn selja havhest ella náta í Vágsbotni ella privat. Ein delikatessa sum verður etin eina ella tvær ferðir um árið.

Vit kunnu saman við høvundinum Donald S. Murray spyrja, hví tað enn eru fólk við havleiðirnar í útjaðaranum av Evropa, sum enn brúka tíð og kreftir at veiða fugla á slíkum støðum sum Súluskeri og Mykineshólmi, og sum dáma væl tann treysta, sterka og við hvørt eisini eitt sindur snikkenda smakkin av súlu og øðrum sjófugli, fyri ikki at tosa um grind og spik.

## Ein felags veiðimentan

Tað, at læknar ávísa tað vandamikla í at eta umhvørvisdálkað tvøst og spik, hevur hesar dagar vakt djúpar kenslur í mongum føroyingi. Hví? Jú, tí her verði nomið við ein ógvuliga týdningarmiklan part í okkara mentan, ikki bert tí tað snýr seg um mat, men tí so nógv annað hjá nógvum hongur uppi í háttinum at fáa fatur á hesum mati, sum kanska er eins týdningarmikið. Eitt nú felagsskapurin hjá súlumonnunum á Súluskeri, sum ger teir til nakað serligt í einum staðbundnum mentanarligum høpi. Teir binda ein søguligan trá aftur í tíðina. Teir eru stabundnir mentanarberarar. Tí fara teir ár um ár út aftur á Súlusker á sama ár sum farið verður á drangarnar og Mykines eftir súluni. So leingi tað eru ein ella tveir sum stíla fyri og fáa aðrar við sær, so dettur hetta ikki niðurfyri. Súlan í Mykinesi er tíverri so sjáldsom og so lítið er til av henni, at tað eru bert tey allarfægstu, tey við røtrum til oynna, sum hava møguleikan, eins og tey útvaldu á Hebridunum, at fáa hana undir tonnina.